LØGTINGIÐ
Umsitingin

Jógvan á Lakjuni
løgtingsformaður

19. januar 2022
j. nr. 1111-20210001
(at tilskila í svari)

**Tilmæli í sambandi við setan av kanningarstjóra**
Í framhaldi av áheitanini um setan av kanningarstjóra, dagfest 21. okt. í fjør, hevði løgtingsformaðurin 8. november fund við teir tríggjar floksformenninar fyri tingmenninar, sum komu við áheitanini um setan av kanningarstjóra. Á hesum fundi varð greitt frá uppriti frá Løgtingsumsitingini um umbidnu kanningina, og at umsitingin bert kundi mæla til, at kanningarstjóri verður settur at kanna útlutingina av fiskirættindum í 2020 og 2021.

Umboðini fyri tingmenninar (Høgni Hoydal, Aksel V. Johannesen og Ruth Vang) vórðu biðin um at hugsa um støðuna av nýggjum, og í teldubrævi 18. november í fjør svarar Høgni Hoydal teirra vegna, at tey standa við umbøn teirra um kanningarstjóra og kanningarsetning av øllum trimum tíðarskeiðunum, og at um løgtingsformaðurin ynskir útgreinandi viðmerkingar, grundgevingar ella nágreiningar, senda tey fegin hesar sum skjótast.

Einki nýtt kom fram á hesum fundi ella í hesum skrivi, sum fekk umsitingina í Løgtinginum at broyta støðu í mun til upprit okkara, dagfest 1. nov. 2021.

Løgtingsformaðurin valdi at hava ein nýggjan fund við floksformenninar um málið, og var hesin fundur hildin 6. januar í ár. Aftaná fundin hava floksformenninir sent løgtingsformanninum ískoytisgrundgevingar fyri áheitan teirra um at seta kanningarstjóra at kanna øll trý tíðarskeiðini, sum upprunaliga ynski fevndi um.

Treytin fyri at seta ein kanningarstjóra sambært § 38, stk. 2 í Stýrisskipanarlógini er, at *illgruni er um, at óregluliga hevur verið atborið,* soleiðis at hesin kann meta um, hvørt grundarlag er fyri at *staðfesta politiska ella løgfrøðiliga ábyrgd* fyri møguligum feilum.

Í ískoytisgrundgevingum sínum vísa floksformenninir viðvíkjandi tíðarskeiðnum 2010 og frameftir á ymiskt, sum hevur verið alment frammi í 2010-12 og til eina sending í KVF í 2020, sum lýsti støðuna í hesum tíðarskeiðnum. Hetta broytir einki uppá okkara fatan, at tað ikki er grundarlag fyri at seta ein kanningarstjóra nú, fyri at staðfesta møguliga ábyrgd fyri hetta tíðarskeiðið, tí ein slík ábyrgd vil vera løgfrøðiliga fyrnað og ikki politiskt aktuel í dag. Afturat hesum kemur, at fleiri løgting síðani hava havt møguleika at taka stig til at kanna hetta nærri, men hava latið vera við hesum.

Tað kann uttan iva vera søguliga og/ella politiskt áhugavert at kanna fiskivinnuumsitingina hetta ella alt tíðarskeiðið, men amboðið til tess er so ein § 19-kanning heldur enn eitt kanningarstjóra-mál sbrt. § 38 í Stýrisskipanarlógini.

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

LOGTING.FO

Tá ræður um tíðarskeiðið 2018-19 grundgeva floksformenninir við tí politiska kjakinum og skuldsetingunum, sum tey, ið vóru ónøgd við politikkin og umsitingina av hesum, hava ført fram tá. Hvørki í kanningarstjóraumbønini ella í seinna ískoytinum hava tingmennninir kunna víst á nakran staðfestan ella grundaðan illgruna um, at skeivt ella ólógliga hevur verið borið at fyri tíðarskeiðið 2018-19. Víst verður einans á politiskar ósemjur og kjak og ónøgd frá teimum, sum ikki fingu rættindi. Umbønin hesum viðvíkjandi ber tí heldur brá av at vera ein áheitan um eina kanning, sum skal meta um ella gera upp við tey uppáhaldini, sum komu fram.

Havast skal í huga, at Løgtingið og táverandi andstøða, hóast politiska kjakið og ósemjurnar, valdi ikki at gera meira við hetta málið, men at andstøðan ístaðin ynskti ein kanningarstjóra settan at kanna flyting av veiðiloyvum í sama samgongutíðarskeiði.

Løgtingsumsitingin dugir illa at síggja, at endamálið við minnilutaverjuni í § 38 í Stýrisskipanar-lógini at krevja ein kanningarstjóra settan, tá Løgtingið annars ikki ger meira við eitt mál, skal vera, at eitt "fráfarið landsstýri" skal biðja um ein kanningarstjóra at kanna sína egnu embætisførslu í seinasta valskeiði, grundað á politiskar ósemjur um, hvussu lóggávan og umsitingin av hesari hevur verið. Um farið verður inn á hesa leið, kann hetta hava sera óhepnar avleiðingar fyri skipanina og nýtsluna av henni frameftir. Treytin má vera, at tey sum biðja um kanningina, vísa á, *hvat tey halda vera galið, og at tey halda, at ólógliga hevur verið borið at.* Hetta er ikki galdandi fyri umbønina um at kanna tíðarskeiðið 2018-19.

Løgtingsumsitingin mælir tí framvegis løgtingsformanninum til einans at seta ein kanningar-stjóra at kanna umsitingina av útlutingini av fiskirættindum í 2020 og 2021 samsvarandi pkt. 1 í áheitanini. Víst verður annars til áðurnevnda upprit okkara, har víst varð á møguleikan, at Løgtingið kann seta eina § 19-nevnd at kanna fyrru tíðarskeiðini, um ynski er um tað.

Vinarliga

Johnhard Klettheyggj
løgtingsstjóri